Nr. 101/2019

Kristina Háfoss
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um upplating av landamørkum uttan COVID-19 kanningar, settur løgmanni, Bárði á Steig Nielsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hví verða landamørkini latin upp 15. juni uttan at COVID-19 kanna øll, ið koma til Føroya?
2. Er ætlanin ikki at seta lógarkrav um, at øll, sum koma til Føroya, skulu COVID-19 kannast?
3. Um valt verður at kanna øll, ið koma til Føroya, hvussu skjótt kann hetta vera klárt – og hvussu nógv skulu ferðafólk vænta at rinda fyri tílíka kanning?
4. Hví verður latið upp fyri somu londum sum Danmark – heldur enn at landsstýrið sjálvt tekur støðu til, hvørjum londum latið verður upp fyri?
5. Í juni mánaði lata flest øll ES-lond mørkini upp hvør fyri øðrum – ætlar løgmaður, at allir borgarar í ES tá eisini kunnu koma til Føroya?
6. Hvat hevur løgmaður gjørt fyri at tryggja, at føroyskir myndugleikar sjálvir taka avgerð um, hvørjum londum Føroyar lata upp fyri?

Viðmerkingar

Landsstýrið hevur boðað frá, at 15. juni verða landamørkini í Føroyum latin upp fyri Íslandi, Grønlandi og Danmark. Eftir 15. juni verður ikki neyðugt við sóttarhaldi fyri borgarar úr hesum londum.

Tá Danmark boðaði frá, at nú fór Danmark at lata upp fyri borgarum úr Týsklandi og Noregi, varð fráboðað frá landsstýrinum, at nú vóru borgarar úr Týsklandi og Noregi eisini vælkomnir til Føroya, uttan sóttarhald, 15. juni.

Í dag hevur Finnland boðað frá, at tey lata upp fyri Norðurlondum og Baltisku londunum – tó ikki Svøríki. ES hevur eisini boðað frá, at ynskt verður, at øll ES lond lata upp fyri hvørjum øðrum 15. juni. Sjálvt Spania hevur fingið áheitan um at lata teirra mørk upp fyri øðrum ES londum 15. juni. Sum kunnugt er Danmark eitt ES land, og verður tí væntandi opið til Danmarkar úr flestu europeisku londunum fyrsta dagin. Harvið verður eisini opið til Føroya – um landsstýrið heldur somu kós sum higartil.

Samstundis hevur landsstýrið onki lógaruppskot lagt fyri Løgtingið um at krevja, at øll, ið koma til Føroya, skulu COVID-19 kannast. Hinvegin er lógaruppskot lagt fyri tingið um at útvega heimild at kunna stongja matstøð og skeinkistøð.

Sum skilst hevur landsstýrið enn onga loysn, tá umræður at fremja COVID-19 kanningar av øllum, ið koma til Føroya. Eisini er boðað frá, at latið verður upp 15. juni uttan at kanna øll, ið koma til Føroya. Hetta er ein váði fyri okkara fólk og samfelag. Kostnaðurin kann gerast stórur bæði menniskjansliga og búskaparliga. Vit hava annars kanningarstovur, starvsfólk og vitan í Føroyum. Umframt Heilsufrøðiligu starvsstovuna, hava eisini privat feløg víst á, at tey eru til reiðar at fremja COVID-19 kanningar av øllum, ið koma til Føroya, um hetta verður umbiðið. Hetta kundi verið gagnnýtt og harvið minkað um váðan fyri okkara fólk.

Fyri at fáa lýst málið verður hesin spurningur settur løgmanni. Av tí, at landamørkini verða latin upp 15. juni, er vónin, at tað ber til at fáa svar skjótast tilber.

Á Løgtingi, 12. juni 2020

Kristina Háfoss